VB-HB 0-2 (0-1):

# VB hekk eftir

*Næstbesta liðið hjá HB vann týdningarmikla dystin í Vági, og lyfta seg harvið eitt langt fet úr botninum*



**HB skapti sær eitt harðliga tiltrongt hol niður til botnsessirnar, tá teir vunnu týdnignarmikla dystinum móti VB**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Hjá bæði HB og VB hevur árið higaritl sýnt, at liðini kunnu fáa stórar trupulleikar í royndunum at halda sætið í næstbestu deildini. Nakað sum annars verður mett at hava alstóran týdning fyri tilveruna hjá besta liðnum, sum soleiðis hevur stytst møguligan veg niður til eykamenninar, eins og yngru leikararnir hjá feløgunum fáa eina glíðandi tilvenjing til fótbólt í bestu deildini.

### Vánaligt spæl

Tí hevði dysturin í Vági alstóran týdning fyri bæði liðini. VB, sum fyri fyrstu ferð hevur næstbesta liðið í deildini, var undan dystinum niðast við trimum stigum, meðan HB var beint oman fyri strikuna við einum stigi meira.

Leikliga var talan á ongan hátt um nakað stórt fótbóltsupplivilsi leygardagin. Hjá báðum pørtum var talan um fráveru á besta liðnum, og sum vera man, so viðførdi hetta, at menn úr frægara endanum vóru tiknir av liðnum.

Tað var tó HB, sum hevði betra takið í góðveðrinum leygardagin, og teir fingu eisini eitt mál hvørju megin steðgin. Fyrru ferðina var tað stórtalentið, Rókur á Fløtum Jespersen, sum var á rætta staðnum, og í seinna hálvleiki var kviki Ransin N. Djurhuus eirindaleysur, tá hann avgjørdi fyri gestirnar.

### Trýst á VB

Tapið fyri einum av kappingarneytunum í botnstríðnum hevur við sær, at tað longu nú byrjar at síggja hálvgum svart út hjá vágbingunum í stríðnum at halda sætið í deildini.

Enn eru tó ikki allar súður syftar. Fleiri ungir og evnaríkir eru á liðnum, og so hvørt sum alt fleiri leikarar verða tøkir til besta liðið, so styrkjast fortreytirnar hjá teimum næstbestu, men tapið ger, at trýstið at fáa stig næstu dystirnar er enn størri. Kanska er tað tó ein lítil skái, at VB hevur ein dyst til góðar í mun til hini botnliðini. Hesin er móti B36, og hevur kappingarnendin hjá FSF nú gjørt av, at tann dysturin skal spælast 6. juli.

**Dysturin í tølum:**
**VB-HB 0-2 (0-1)**
0-1: Rókur Jespersen
0-2: Ransin N. Djurhuus

ÍF-NSÍ 4-0 (1-0):

# Ferð á fuglfirðingum

**Eftir ein vánaliga byrjan eru teir í ÍF veruliga komnir ígongd, og leygardagin vunnu teir tryggan sigur á næst bestu runavíkingunum**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Tað sá einki út hjá fuglfirðingum, tá teir innan tvær vikur vóru við undirlutan móti bæði B36 og LÍF. Ein vend var tó at hóma, tá teir fingu javnleik í Sumba, og síðani hevur veruliga fingið ferð á.

Leygardagin høvdu teir vitjan av NSÍ, og sum væntað gjørdist aftur hesa ferð talan um trý stig.

Sigurin gjørdist upp á fýra mál, men leingi var tó líkt til, at tølini als ikki skuldu vera so sannførandi.

Í fyrra hálvleiki kom bert tað eina málið, tá Heini Heinason onkursvegna fekk sent eitt skot framvið málverjanum hjá NSÍ, sum helst var órógvaður av nógvu sólini.

Í seinna hálvleiki helt ÍF á at trýsta. Leingi vardi NSÍ fyri, men áhaldandi og ágangandi spælið gav tó at enda úrslit, soleiðis at talan gjørdist um ein sannførandi sigur.

Við sigrinum hava fuglfirðingar vunnið seg upp á fjórða plássið í stigarøðini, og møguleikin at koma longur upp skuldi verið góður. Komandi tvær vikurnar eita mótstøðuliðini VB og HB, og í báðum førum er talan um lið, sum eru stødd niðarliga á talvuni, so fuglfirðingarnir eru í øllum førum at meta sum favorittar til teir dystirnar.

Runavíkingar fingu sostatt heldur ikki nakað burtur úr hesaferð, men ábendingar eru um, at tað skjótt fer at bragda hjá teimum. Undanfarna vikuskiftið høvdu teir leingi eitt sera gott tak á FS Vágum, og hesa ferð var tað so ÍF, sum fekk ein skarpan gang. Komandi vikuskiftið kemur enn eitt oddalið, nevnliga LÍF, á vitjan, og so er spurningurin, um triðja ferðin verður tann rætta hjá NSÍ.

**Dysturin í tølum:**
**ÍF-NSÍ 4-0(1-0)**
1-0: Heini Heinason
2-0: Høgni á Lakjuni
3-0: Høgni Zachariasen
4-0: Eyðálvur R. Petersen

Sumba-ÍF 1-2 (1-1):

# Sumba misti oddasessin

**Leirvíkingar staðfestu, at teir vilja verið í oddinum, tá teir gjørdust teir fyrstu at basa sumbingunum**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Grundað á gongdina í fjør, so er tað kanska eitt sindur óvæntað, men veruleikin er, at bæði Sumba og LÍF veruliga hava gjørt um seg í aðru deild í ár, so talan var um oddadyst, tá liðini bæði hittust á Krossinum leygardagin.

Sumbingar høvdu undan hesum ikki tapt dyst í landskappingini í ár, men tað var so broytt, tí við stríðsandanum sum fremsta vápninum eydnaðist tað leirvíkingum at bjarga sær øll trý stigini við heimaftur.

Tað vóru annars sumbingar, sum byrjaðu betri, tá Eirikur Joensen sneiddi verjuleikara av sær, áðrenn hann sendi í kassan, men løtu seinni hevði LÍF tó fingið javnvág í aftur roknskapin.

Seinna umfarið royndu bæði liðini at trýsta. Sumbingar høvdu kanska teir vandameiru møguleikarnar, men tað kom bert eitt mál, og tað áttu leirvíkingar, tá Petur Sjúrðarberg átti seinasta fótin á.

### Avgerandi vikur

Við sigrinum fóru leirvíkingar framvið sumbingum, men tá FSV samstundis vann, eru teir enn ikki komnir á ovastu rók. Um tað fer at eydnast teimum at koma so langt, fara millum annað teir komandi dystirnir at vísa.

Tá vitja teir fyrst í Runavík, áðrenn leiðin gongur til Sands, har heimaliðið tykist vera í djúpari kreppu í løtuni, og tað er ikki óhugsandi, at hesir dystirnir fara at kasta nøkur stig av sær.

Sumbingar skulu komandi vikuskiftið til Havnar at spæla móti HB, áðrenn teir annað vikuskiftið skulu til eina rætta próvtøku, tá nýggja oddaliðið úr Vágunum kemur á vitjan.

**Sumba-LÍF 1-2(1-1)**
1-0: Eirikur Joensen
1-1: Kristian í Vági
1-2: Petur Sjúrðarberg



GÍ-VB 2-1 (2-1):

# Nú fer at líkjast



*Vágbingar royndu stóran part av dystinum at trýsta GÍ, sum hinvegin vóru sera vandamiklir, tá teir við fullari ferð kontraðu niðan eftir vøllinum*

*Mynd: Jonhard Hammer*

**Eftir at teir tíðliga í dystinum høvdu bæði javnað og lagt seg á odda, dúvaði GÍ í longum løtum upp á kontrabólt, og við størri nærlagni kundi sigurin væl verið størri**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Kreppa er kanska dekan ov sterkt orð at nýta, men tað var eingin loyna undan dystinum í Sarpisgerði, at her vóru eingi serlig ráð at missa hjá hvørgum av pørtunum.

### Ferðin kom upp

Og leikararnir á báðum liðum løgdu eisini alt fyri eitt til brots, sum um einki annað enn sigurin taldi. Leikferðin varð beinan vegin á slíkum støði, sum liðini bæði í alt ov lítlan mun hava megnað higartil í ár, og tað gingu heldur ikki meira enn átta minuttir, fyrr enn hol varð sett á málskjótingina.

Við tveimum ella trimum millumstøðum spældi VB seg skjótt niðan móti brotsteiginum hjá gøtumonnum. Mortan í Hørg fekk bóltin, og eftir at hava drigið fram við verjuleikara sendi hann bóltin upp í handara málhorn uttan møguleika hjá Halli Hansen at verja fyri.

Ein av avgjørdu styrkjunum hjá VB hevur seinnu árini verið tætta verjan, sum hevur verið góður botnur undir einum kontraspælið. Við skjótu leiðsluni átti eisni at ligið væl fyri at bíða eftir mistøkunum frá mótstøðuni.

Hetta var eisini ætlanin hjá VB, men tvær væl vandar deyðbóltsstøður frá gøtumonnunum koppaðu tó øllum á høvdið.

Bert fimm minuttir eftir leislumálið, var Sámal Joensen fyrstur á, tá horna varð sent innfyri, og so stóð á jøvnum, og tá Bartal Eliasen drønstútaði eftir enn eitt hornaspark stutt eftir, var tað brádliga GÍ, sum var á odda, og nú vóru tað eisini teir, sum kundu spæla kontrabólt.

Sum tølini siga, so komu ikki fleiri mál í dystinum, men tað var so avgjørt ikki, tí at møguleikarnir ikki vóru til staðar.

GÍ legði seg nakað aftur á vøllin, og lat í stóran mun vágbingarnar um at skapa dystin, men teir gróvu seg tó á ongan hátt niður í egnum brotsteigi. Heldur stóðu teir alla tíðina til reiðar at fara fram í drepandi mótálopum, og fleiri ferðir var eisini um reppið, at hetta eydnaðist teimum. Við kvikum og neyvum samanspæli vunnu teir seg fram til fleiri møguleikar, og í øllum førum man Súni Fríði iðra seg um, at tað ikki eydnaðist honum at skora upp á í minsta lagi tveir av hesum.

Misnýttu møguleikarnir kundu kostað teimum heilt nógv, tá Robert Ciezlewicz í seinna hálvleiki fekk gyltan møguleika, men við mest sum opnum máli megnaði at senda framvið málinum og liggjandi málverjanum, men nærri enn tí sama komu vágbingarnir ikki.

### Fer at líkjast

Fyri vágbingarnir mundi tapið kennast sera svárt, nú teir mistu ein ítøkjuligan møguleika at fáa samband aftur við liðini, sum liggja beint undir oddinum. Yvir høvur hevur tað tókst soleiðis hjá VB í ár, at teir hóast gott spæl í fleiri dystum ikki hava megnað at skapt teir møguleikar, sum skulu til, og heldur ikki hava teir verið nóg neyvir, tá so møguleikarnir eru komnir.

Hjá GÍ hevur talan heldur ikki verið um sama pressfótbólt, sum teir hava sýnt nógvu av undanfarnu árunum, men sunnudagin líktist tað til tíðir. Við skjótu leiðsluni var kanska ikki neyðugt at trýsta so nógv, men liðið arbeiddi væl, og spælið gekk bæði skjótt og væl fyri seg, tá teir royndu at seta ferð á niðaneftir.

Og hóast úrslitini ikki hava verið eftir vild hvørja ferð, so er GÍ á ongna hátt siglt afturúr í kappingini. Fýra stig eru upp til oddaliðið, men við 12 dystum eftir á skránni, nýtist tað ikki at vera størsta forðingin.

Stóri trupulleikin hjá liðnum kann tó verða, at breiddin í hópinum als ikki er so stór, sum hon hevur verið onkur av undanfarnu árunum. Næst besta liðið flutti í fjør niður í triðju deild, og hetta sigur nakað nógv í so máta, og eitt nú er álopsparturin í løtuni sera skerdur, nú Krzystof Popczynski ikki er tøkur.

Gøtumenn plaga tó vanliga at vera drúgvir, tá tøk skulu takast í fótbóltsoddinum, so hóast mótstøðuliðini helst av øllum alvi vilja leggja fótonglar fyri, so er lítið at ivast í, at teir kortini fara at roynast drúgvir, tá avtornar.

**Dysturin í tølum**
**GÍ-VB 2-1 (2-1)**
0-1: Mortan í Hørg, 8
1-1: Sámal Joensen, 13
2-1: Bartal Eliasen, 16
Dómari: Oddmar Andreasen

GÍ: Hallur Hansen - Hans Pauli Petersen, Pól Ennigarð, Bartal Eliasen, Leivur Hansen – Magni Jarnskor, Sámal Joensen, Zdizlaw Janek, Súni Olsen – Magnus Skoralíð, Súni Fríði Johannesen
VB: Bjarni Johansen – Predrag Zivkopvic, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen – Dan Djurhuus, Marek Vierzbicki, Michael í Lágabø, Jón Gærdbo, Mortan í Hørg – Nenad Zivanovic, Robert Cieszlewicz

KÍ-FS Vágar 1-2 (0-2):

# Vágamenn einsamallir á odda

**FS Vágar tykist hava beina kós móti fyrstu deild, og aftur hetta vikuskiftið fingu teir fulla úrtøku**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Longu undan kappingini var tað mest sum ein staðfesting, at FS Vágar vóru risa favorittar at flyta upp úr næst bestu deildini, og nú triðingurin av kappingini er lokin, eru teir loksins komnir upp á ovastu rók.

Onkur var kanska farin at ivast, tá vágamenn fyrst taptu fullkomuliga óvæntað fyri HB í Havn, og síðani spældu málleysan javnleik á Sandi, men síðani hava teir ikki litið aftur um bak.

Leygardagin vitjaðu teir so í góðveðrinum norðuri í Klaksvík, og har var skjótt greitt, at gestirnir ætlaðu sær stigini.

KÍ hevði mist fleiri av vanliga føstu leikarunum upp til besta liðið, og meðan teir stríddust at fáa nýggja verjupartin at rigga, gjørdu gestirnir sítt besta til tess at taga alt frá hvørjum øðrum.

Smáir fimtan minuttir vóru leiktir, tá tað fyrstu ferð bragdaði hjá FSV Vladlens Osipov hevði dittað sær framvið í einum álopið, og staddur nakað uttan fyri brotsteigin smekkaði hann til. Flata og harða skotið tók í stólparótina uttan nakran møguleika hjá málverjanum, og so var 1-0.

Stutt eftir økti vandamesti maðurin í aðru deild, Clayton Soares. Eftir eitt framhalandi trýst á KÍ-verjuna stóð brasiliumaðurin brádliga leysur í brotsteiginum, og tá málverjan kom út ímóti, var hann púra kaldur og lyfti bóltin í einum bleytum boga í netið.

### Mundu mist

Hesa løtuna sá av álvara svart út hjá KÍ. Vágamenninir dusaðu sær mest sum eftir vild, og tað var rár hending, at bólturin yvir høvur ferðast yvir um miðlinjuna.

Í seinna hálvleiki helt sama gongdin fram. Vágamenn tóktust ætla sær fleiri mál, og tí settu teir ikki ferðina niður, hóast hetta kanska hevði verið skilagott.

Tað var nevnliga ikki altíð, at beinini fylgdu við ferðini, og spakuliga byrjaðu klaksvíkingarnir at ota seg inn í dystin. Ikki minst dúvaðu teir nógv upp á teir báðar, Erling Fles og Olgar Danielsen í álopspartinum, og ein nýggj vón varð tendrað, tá tað eydnaðist Erlingi at beina bóltin í málið.

Tað vóru framvegis vágamenn, sum høvdu meira spælið, men í fleiri førum var av álvara vandi fyri, at teir skuldu missa í verjupartinum, og sum heild munnu teir vera fegnir um, at eingi stig vórðu søplaði burtur seinastu løtuna.

### Eru oddalið

Sigurin saman við sigrinum hjá LÍF í Sumba ber við sær, at FS Vágar loksins eru á odda í aðru deild, soleiðis sum teir ætlaðu sær av fyrstan tíð.

Hvørt teir veruliga ætla sær at halda fast um hendan sessin, fæst helst ein greið ábending um komandi vikurnar. Eftir at teir komandi vikuskiftið fáa vitjan av B36, verður talan tá nevnliga um dystir móti Sumba og ÍF, og fæst ein munandi úrtøka burtur úr hesum dystunum, so er lítið at ivast í, at vágamenn hava fast samband við bestu deildina, tá oyggin fær fast samband við meginøkið.

**KÍ-FS Vágar 1-2 (0-2)**
0-1: Vladlens Osipov
0-2: Clayton Soares
1-2: Erling Fles